## UTTAN ÚR HEIMI

*Framhald av s. 31*

sær sum frægast innan fyri landamarkið. Sambært Jan Egeland er Somalia ein av teimum ringastu vanlukkunum, sum heimssamfelagið hevur gloymt.

### Kongo

Kreppan í Demokratiskia Lýðveldinum Kongo er gomul. Morð og forfylging hava verið gerandiskostur har síðani 1959.

Fleiri ferðir hava hermenn hjá grannalandinum Rwanda gjørt innrás inn um markið at jagstra hutu-hermenn, sum vóru uppi í fólkamorðinum í Rwanda í 1994. Ein innrás var í 1998, og hon endaði við einum fimm ára longum kríggi, har seks lond vóru uppií. Tá teir fremmandu hermenninir fóru avstaðaftur, lá Demokratiska Lýðveldið Kongo í sori. Eingin veit við vissu, hvussu mong mannalív kríggið kravdi, men flestu metingar siga, at talan var um fleiri milliónir, og heldur ikki í dag kunnu fólk har kenna seg trygg.

ST-aðalfundurinm hevur umrøtt viðurskiftini í Kongo, og Kofi Annan, aðalskrivari, hevur fleiri ferðir síðani sagt seg stúra fyri gongdini har. ST hevur 10.000 hermenn í Demokratiska Lýðveldinum Kongo, men teir eru alt ov fámentir. Kofi Annan hevur biðið altjóða samfelagið tvífalda talið, men áhugin hevur verið so sum so.



*-Vesturheimurin hevur víst eitt óvanligt hjálpsemi í sambandi við flóðalduna í Suðurasia. Í Afrika kann ein vanlukka krevja líka mong mannalív, uttan at heimssamfelagið letst um vón. (Jan Egeland, neyðhjálparsamskipari hjá ST.)*



*-Flóðalduvanlukkan var ein Guðs gerð, ein náttúruvanlukka, sum vit ikki kundu forða. Men trupulleikarnir í Afrika eru mannaverk. Har doyggja fleiri milliónir á hvørjum ári, og tað kunnu vit gera nakað við. (Írska rockstjørnan Bob Geldof, sum í 1985 var høvuðsmaðurin aftan fyri stóra innsavningarátakið "Live Aid" til frama fyri tey fátæku í Afrika).*

### HIV/AIDS

Vanliga rokna vit HIV/AIDS sum eina heilsuvanlukku, men í veruleikanum er tað ein stór menningarvanlukka. Kring heimin eru 42 milliónir fólk skrásett HIV-positiv, og av teimum búgva meiri enn 95 prosent í londunum sunnan fyri Sahara. Har doyggja tíggju ferðir so mong av AIDS sum av kríggi og øðrum kreppum. Sjúkan er eirindaleys og ger ikki mun á fólki. Tí rakar hon møður, pápar, lærarar, starvsfólk í heilsuverk-inum, onnur almenn starvsfólk og arbeiðsmenn. Avleiðingarnar eru, at samfelagsbygnaðurin fer av lagi.

Nú ger HIV/AIDS so nógv um seg í stórum pørtum av Afrika, at sjúkan er vorðin ein hóttan fyri friðin í økinum. Eisini hetta hevur trygdarráðið hjá ST umrøtt, og Kofi Annan hevur eisini sagt seg stúra fyri tí, sum er í ferð við at henda. Men tað knípir við at taka tey neyðugu tøkini.

Kanska fara heimsins fjølmiðlar ein dag at senda síni tíðindafólk og myndafólk til Afrika.